# »Fundamentalisturin« fekk dramatikaraheiðurslønina

**Norðurlendska dramatikaraheiðurslønin varð leygardagin latin finska leikskaldinum Juha Jokela fyri leikritið ”Fundamentalisturin”, ið føroyski leikbólkurin TVAZZ setti upp í fjør**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Finska leikskaldið Juha Jukela*

Millum heili 200 leikrit valdi Nordisk Teaterunion (NTU) í ár at lata finska leikskaldinum Juha Jokela norðurlendsku dramatikaraheiðurslønina fyri leikritið ”Fundamentalisten” frá 2006.

Leikurin snarar kring ymsar fatanir av trúgv og átrúnað, og vakti hann stóran ans, tá leikbólkurin TVAZZ framførdi hann í Føroyum í fjør heyst.

### Vónríkur leikur

Í grundgevingini fyri at lata finska leikskaldinum heiðurslønina var millum annað sagt, at ”Fundamentalisten” er ein upplívgandi, intelligentur og vónríkur leikur um átrúnað, um menniskju fjøtraði av átrúna og um samanbrestin millum ymsar fatanir av trúgv.

Víðari varð sagt, at leikurin hjálpir tær at síggja, at fundamentalisma er so nógv meira enn trongskygdir menn í turban og gevur tær møguleika at kaga inn í tankaverðina hjá fundamentalismuni ístaðin fyri bert at fordøma. Ein tekstur, ið borar óvanliga djúpt niður í grundleggandi spurningar hjá menniskjanum. Eisini er leikurin genialur í sínum einfalda dramaturgiska bygnaði genialur. Málið í leikinum avdukar tann iva, sum goymir seg aftan fyri tilvandu leiklutirnir og tankamynstini hjá persónunum á pallinum. Leikurin hevur verið spældur í seks ymsum leikhúsum síðani frumframførsluna á Teater Jurkka í Finlandi í 2006.

### Føroysk luttøka

Handanin av heiðurslønini fór fram í Tampere, sum var karmur um sjónleikafestivalin Nordic Showcase and Drama Forum í farnu viku.

Í hesum sambandi varð føroyski leikbólkurin TVAZZ boðin við at gestaframføra ”Fundamentalisten”. Tað var eisini TVAZZ, sum stóð fyri fyrstu uppsetingini av leikinum uttan fyri Finland, tá tey framførdu leikin í Føroyum í fjør heyst, og vóru tað somu leikararnir, Bárður Persson og Gunnvá Zachariasen, sum framførdu í Tampere. Spælt varð á føroyskum við enskum og finskum undirteksti, og varð leikurin sera væl móttikin. Á sjónleikafestivalinum varð eisini skipað fyri kjakfundum av ymsum slag. Eitt nú luttók føroyski søgufrøðingurin Hans Andreas Sølvará í kjaki undir evninum ’Taboos in the Theatre’ saman við umboðum úr Íslandi, Svøríki og Danmørk.



*Føroyski leikbókurin TVAZZ varð boðin við at gestaframføra ”Fundamentalisten” í sambandi við at finska leikskaldið Juha Jokela um vikuskiftið fekk Norðurlendsku Dramatikaraheiðurslønina fyri leikin*

### Hørð kapping

Norðurlendska dramatikara– heiðurslønin verður annaðhvørt ár latin einum leiki, sum hevur havt frumframførslu seinastu tvey árini.

Í uppskoti til heiðurslønina í ár vóru so frægir leikir sum: ”Fundamentalisten” eftir Juha Jokela, Finland, ”Óhapp!” Eftir Bjarni Jónsson, Ísland, ”Om et øjeblik” eftir Peter Asmussen, Danmark, og ”Valerie Solanas ska bli president i Amerika” eftir Sara Stridsberg, Svøríki.

Ongi leikrit vóru í uppskoti úr Føroyum og Noreg í ár. Nevnast kann, at Jóanes Nielsen fekk heiðurslønina í 2002 fyri leikin *”Eitur nakað land weekend?”*

Norðurlenska dramatikaraheiðurslønin varð latin á fyrsta sinni í 1992. Saman við heiðrinum fylgja 5000 evrur.

# Gloypibitar av Tóroddi Poulsen







*Frá filminum hjá Katrini Ottarsdóttir ”Ein regla um dagin má vera nokk” um listamannin Tóroddur Poulsen*

**»Ein regla um dagin má vera nokk« er heitið á nýggjum filmi, har Katrin Ottarsdóttir borðreiðir við gloypibitum av listamanninum Tóroddi Poulsen**

FILMUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Filmsrøðin hjá Katrin Ottarsdóttir um føroysk listafólk og teirra skapanartørv heldur nú fram. Annar filmurin í røðini av trimum er nú á veg, og hevur virkna filmskvinnan hesuferð vent upptøkutólinum móti yrkjaranum og listamanninum Tóroddi Poulsen.

### *Tóroddurska* tíðin

Tóroddur Poulsen (f. 1957) verður ofta lýstur sum ”svarti punk-poeturin”. Og hóast lýsingin kann tykjast ov trong, so er tað júst hansara anarkistiska, eksperimenterandi og sniðfundiga tilgongd til yrkingina eins og til lívið, ið eyðkennir hansara listarliga virkið sum yrkjari, myndlistamaður og tónleikari.

Sermerkti listamaðurin letur ikki hvønn sum helst sleppa inn í sín heim. Og innkomin mátti Katrin Ottarsdóttir sanna, at tað var ávíst, hon mátti lata sær lynda

- At vera saman við Tóroddi merkir, at tú mást sættast við, at her gongur tíðin við tí ferð, sum Tóroddur heldur, at hon skal ganga við. Ikki skjótt, ikki seint, men *Tóroddurskt*, sigur Katrin Ottarsdóttir og leggur afturat.

- Tankar og hugskot koma, tá tey koma, kanska koma ongi orð tann dagin, tú vilt hava tey at koma; men so koma tey tess sterkari tann dagin, tá tú ikki hevði roknað við nøkrum.

Hon leggur afturat, at saman við Tóroddi ber tað ikki til at spáa um nakað. Tóroddur sigur ikki hvat sum helst við hvønn sum helst, og eitt upptøkutól ger teg hvørki meir ella minni áhugaverda í hansara eygum.

- Tóroddur veit, nær hann hevur givið tær eina hóskandi dosis. Og hann er ikki oyðslutur. Ofta fært tú onki. Og so allíkavæl ...! Lurtar tú væl, er tað altíð hatta *Tóroddurska*, og tað eru hesar gloypibitar, sum eg fegin vil geva øðrum lut í, sigur Katrin Ottarsdóttir í sambandi við, at filmurin nú er á veg.

### Trilogi av listaportrettum

Fimurin ”Ein regla um dagin má vera nokk” er annað portrettið av trimum hjá Katrini Ottarsdóttir av føroyskum listafólkum. Tað fyrsta var um myndahøggaran Hans Paula Olsen í filminum ”Ongin kann gera tað perfekta”, meðan tað triðja verður um rithøvundan Jóannes Nielsen. Tann filmurin er longu í gerð.

Tað er Blue Bird Film, ið hevur framleitt ”Ein regla um dagin má vera nokk” við stuðli frá Mentanargrunni Landsins, Mentamálaráðnum, Eik Banka, Fjølrit, Listafelag Føroya og Føroya Skúlabókagrunni.

Filmurin um Tóroddur Poulsen verður frumsýndur á Bryggjuni 17. og 18. september klokkan 20, har høvi eisini verður at hitta Katrin Ottarsdóttir til eitt prát um filmin.